



# Free Leif pútur

FreeLeif eru tvær ungar kvinnur, Lív Højsted Horsdal og Fríða Berg, ið seyma litríkar pútur úr endurnýtslutoyi og toyi, tær hava keypt uttanlands.

– Tað, ið tykist at vera nyttuleyst fyri onnur, hava vit endurnýtt og sett øðrvísi saman, siga tær báðar.

Púturnar eru til sølu í Baianstovu



# Spøkilsi Spookey

Ommusonur Elina Lindenskov teknaði fitta spøkilsi Spookey tá hann var 5 ár, sum omman so fór undir at seyma.

– Spooky sigur huuuh uppá tann fitta mátan, so børn sovna væl og droyma fittar dreymar.

Spookey er at fáa í Baianstovu

*Lagt til rættis: Inna Tørnroos*

# Skapandi JÓL

**Í seinnu hálvu av november hendir ár eftir ár - skapandi megin í Føroyum kemur av álvar undan kavi. Bundið, vovið, leir, glas, seymað – hugflogið kennir ongi mørk!**
**Nógv av hesum kemur sjálvandi fram nú, tí jólini nærkast, og jólagávur skulu keypast. Vit hava kagað innar í hugnaligu umhvørvini og funnið nógv lekkur og øðrvísi ting at leggja undir jólatræið.**





# Glaslist

Mikkalina Norðberg er aftur millum tær fimm feitu flugurnar og surrar. Hennara litríku glasting fáa teg í gott lag, og sjálvur Sir Elton John fekk ein av hennara fuglum við sær heim, tá hann var á vitjan í Føroyum í summar.

MikkalinaGlas er at fáa í hæddunum uppi yvir matstovuni Áarstovu.

# Á rókini

Lív Dam ger hesar vøkru fuglar av leiri og rekaviði.

Hon er eisini partur av teimum feitu flugunum.

Fuglarnir eru til sølu í hæddunum uppiyvir matstovuni Áarstovu.



## Verkhúsalist

**Tey ymisku verkhúsini kring landið hava eisini jólasølu.**
**Sera nógv fitt og pyntuligt er at fáa, so støkk inn á gólvið hjá teimum.**

**Verkhús eru at finna á hesum støðum:**
- **Verkstaðið inni á Bakka í Vági**
- **Verkstaðið Vón í Havn**
- **Verkstaðið á Brekku í Klaksvík**
- **Verkhúsið Stíggjur í Saltangará**
- **Verkhúsið í Sørvági**